FRAMTAK
FRAMTAKSGRUNNUR FØROYA

# Frymil til virkisætlan

Virkisætlanin hevur til endamáls at geva eitt skjótt yvirlit yvir handilsmøguleika, bygnað og fíggjarlig viðurskifti í fyritøkuni. Í flestu førum er betri við einari ikki alt ov langari frágreiðing, men sjálvandi er tað eisini ymiskt í hvørjum einstøkum føri. Sum meginregla kann tó sigast, at ein virkisætlan uppá umleið 20 síður kann vera á góðari leið.

Virkisætlanin skal vera grundað á faktum og vísa til viðkomandi keldur. Tað er umráðandi, at marknaðarviðurskiftini verða neyvt kunnaði og lýst við upplýsingum um t.d. støðd á marknaði, vakstrarmøguleikar v.m.

Tað er umráðandi, at ætlanin yvirhøvur hevur hesar upplýsingar:

**Virkisgrundarlag**

- Hvørjum er hugskotið sprottið úr og hvar er tørvurin eftir loysnini, fyritøkan kann bjóða?
- Hvørjir trupulleikar loysir tín fyritøka og hvat er virði fyri kundan (value proposition).
- Hvussu umráðandi er tað hjá kundanum, at trupulleikin verður loystur? Er tað “nice to have” ella “need to have”?
- Tað er umráðandi at hava útsagnir og eftirmetingar frá kundum og samstarvspartnarum.

**Marknaður og kundar**

- Hvat er støddin av samlaða marknaðinum og støddin á tí partinum, sum fyritøkan ætlar at fara eftir fyrst, og hvar?
- Hvussu sær marknaðurin út um trý ár?
- Hvussu sær virðisketan á marknaðinum út og hvar í virðisketuni er fyritøkan?
- Hvør er málbólkurin fyri loysnunum hjá fyritøkuni og hví?
- Hvørjir eru núverandi kundar, hvussu sær “the pipeline” av kundunum út, og hvussu long tíð er til sølu hvørja ferð?

**Vøra**

- Hvørja vøru, tænastu ella loysn selur fyritøkan? Greið frá við greiðum teksti.
- Hvussu sær tøknin út, hvat slag er tøknin, hvussu búgvin er tøknin? Eisini skal prógv vera við um effekt og funktión.
- Hvussu nógv innovatión og differentiering hevur loysnin í mun til annað á marknaðinum, undir hesum substituttar og kappingarneytar?
- Er vøran vard av patenti ella líknandi?
- Hvussu langt er vøran komin í menningartilgongdini, undir hesum tíðspunkt fyri liðugt menning og ætlanir fyri møguligum dagføringum av vøruni (nýggjar versiónir)?
- Hvar verður vøran framleidd og undir hvørjum umstøðum. Er talan um egna framleiðslu ella útveitan?
- Er nakað yvirlit við prísum og framleiðslukostnaði pr. stk.?

**Virkisætlan**

- Hvussu verður umsetningur genereraður?
- Hvussu er prísásetingin?
- Hvussu sær "go to market-strategiin" út?
- Hvørjar distributiónskanalir verða nýttar?
- Hvussu er møguleikin fyri at skalera virkisætlaninina?

**Kappingarstøðan**

- Hvørjir substituttir og kappingarneytar eru til vøruna/tænastuna, undir hesum umsetningur, útbreiðsla, styrki og veikleikar á vørunum, sum longu eru á marknaðinum?
- Hvussu eru møguleikarnir hjá øðrum, sum ynskja at koma inn á marknaðin við líknandi ella betri vørum/tænastum (indtrængningsbarriere)?

**Bygnaður og leiðsla**

- Hvørji eru fólkini aftanfyri fyritøkuna, undir hesum leiklutur í mun til virksemi og fyritøku, bakgrund, royndir.
- Útbúgving, førleikar?
- Hvussu nógv starvsfólk hevur fyritøkan, hvørjir eru lyklapersónar, og hvussu sær bygnaðurin út?
- Hvør er í nevndini?
- Hvørjir eru núverandi parteigarar og hvussu er ognarbýtið?
- Hvussu nógv hevur/hava stigtakararnir sjálvir sett í felagið?
- Nær er fyritøkan stovnað?

**Búskapur**

- Eru roknskapir fyri seinastu árini. Um so er, hvussu er støðan fyri uppgerð fyri rakstrarúrslit og fíggjarstøðu seinastu ársroknskaparárini?
- Hvørji eru málini fyri sølu, hvørjir aktivitetir ella virksemi skulu gerast fyri at røkka málunum, og hvør í organisatiónini hevur ábyrgdina av, at málini verða rokkin?
- Hvørjir viðkomandi "milestones" eru settir fyri at gjøgnumføra ætlanirnar?
- Hvussu sær rakstrarætlanin, fíggjarstøða (balance) og gjaldførisætlanin út fyri tey næstu 3-5 árini?
- Hvussu er býtið millum umsetning, skiftisavlop og sølumál?

**Greining av váða**

- Hvørjir strategiskir, taktiskir og fíggjarligir váðar eru, og hvørjar ætlanir eru gjørdar fyri at avmarka hesir?
- Hvussu sær "what if–scenario" (framtíðarmyndin) út, og hvør er ætlanin, um tað ringasta fer at henda?

**Fíggjartørvur**

- Hvussu stórur er fíggjartørvurin við tí strategi, sum fyritøkan trýr mest uppá?
- Hvat skal peningurin nýtast til, undir hesum íløguætlan og tíðarkarmur?
- Hvussu stór er eginfíggingin?

**EXIT**

- Hvørjir eru exitmøguleikarnir hjá íleggjarunum?
- Hvørjir kunnu vera møguligir keyparar av fyritøkuni?